# Fyrstahjálp til sjálvmorðsfyribyrgjan

TÍÐINDASKRIV

*Psykiatriski Deplin og Sálarfrøðistovan*

Hóast talið av sjálvmorðum í Føroyum er lágt í mun til onnur lond, so vísa kanningar, at talið av føroyskum ungdómi, sum hava tankar um sjálvmorð, og sum hava gjørt royndir at taka lívið av sær, er rættiliga stórt. Royndir aðrastaðni frá vísa, at talið av teimum, sum gera sjálvmorðsroyndir er einar tíggju ferðir størri enn talið av teimum, sum taka lívið av sær, og at vandin fyri at taka lívið av sær er størri hjá teimum, sum hava roynt hetta áður.

Psykiatriski Depilin hevur seinastu árini verið við til at fyriskipað altjóða dagin til sjálvmorðsfyribyrgjan, sum hevur verið hildin við ymiskum upplýsandi tiltøkum í Miðlahúsinum. Arbeitt hevur verið víðari við at gera eina skipan hvussu meira praktiskt kann fara fram á hesum økinum og hvussu serligar atgerðir kunnu takast fyri at fyribyrgja sjálvmorðum í Føroyum eisini.

Í hesum sambandi er Psykiatriski Depilin komin í samband við viðgerðarskipanina VIVAT, sum er norsk og gongur út frá Universitetssjúkrahúsinum í Tromsø. Hetta er ein tilltaging av eini canadiskari skipan Liwing Works Education, sum er tann mest útbreidda skipanin til sjálvmorðsfyribygjan og er tillagað í fleiri londum.

VIVAT er skipað sum eitt fyrstahjálparskeið til fólk, sum á ein ella annan hátt koma í samband við fólk, sum ganga við ætlanum um at taka lívið av sær ella hava roynt hetta. Hugsað verður her um lærarar og lestrarvegleiðarar á miðnámsskúlum, tey sum hava við ymiskt ungdómsarbeiði at gera, bæði í starvi ella sjálvboðin, t.d. ungdómshús, skótar og ítróttarfeløg, tey sum arbeiða á skaðastovum og intensivum deildum, psykiatriskum deildum, løgreglufólk og tey sum koyra sjúkrabil, læknar, sálarfrøðingar, sosialráðgevarar, tey sum hava við starvsfólkaleiðslu at gera umframt onnur áhugaði.

Skeiðið verður hildið í tveir dagar, har tað á ymsan hátt verður arbeitt við at læra fólk at fáa eyga á tey, sum á einhvønn hátt eru í sjálvmorðsvanda, at læra at tora at tosa um hetta og seta teir neyðugu spurningarnar fyri at kunna gera eina meting av vandanum og læra at skipa eina ætlan, sum kann byrgja upp fyri, at lív fer fyri skeyti.

Arbeitt á skeiðnum við at sameina tær royndir, sum eru aðrastaðni frá hesum viðvíkjandi og royndirnar hjá luttakarunum, og arbeiðshátturin er eitt bland av styttri fyrilestrum, tjaki, filmum og bólkaarbeiði.

Vit hava leingi havt ynski um at koma stigið víðari í okkara ætlanum um at skipa serligt fyribyrgingarbeiði í sambandi við sjálvmorð, og halda at hendan canadiska skipanin er sera áhugaverd og hevur fingið stak góðar eftirmetingar og verður hildin at hava havt avgerandi ávirkan á, at talið av sjálvmorðum er fallið, sigur Tormóður Stórá, sálarlækni og læknafakligur leiðari á Psykiatriska Deplinum. Fyri at kanna nærri hvussu hetta hóskar hjá okkum, hava vit valt at taka upp hetta samstarvið við Universitetssjúkrahúsið í Tromsø og tey sum standa fyri norsku útgávuni, sum kallast VIVAT. Á hendan hátt kunnu vit fáa royndar skeiðleiðarar hendan vegin, sum hava arbeitt við skipanini í fleiri ár, og bæði undirvísing og tað umfatandi tilfarið, sum luttakararnir fáa er á norskum, sum fyri tey flestu fellur lættari enn um tað skuldi verið á enskum. Eftirmetingin av skeiðnum kann so geva okkum leiðbeining um hvussu vit koma víðari, og hava vit t.d. møguleika at senda fólk á skeið í Noregi fyri at gerast undirvísarar á fyrstahjálparskeiðnum, so hetta kann gerast ein afturvendandi undirvísing her, tillagað okkara viðurskifti, sigur Tormóður Stórá.

Seinasta heyst varð kunngjørd ein stór kanning av ymiskum viðurskiftum hjá føroyskum ungdómi, og har vóru skelkandi tøl fyri hvussu nógv ungfólk her heima gingu við tonkum um sjálvmorð ella høvdu roynt at taka lívið av sær, nógv enntá fleiri ferðir. Kanningarúrslitini skelkaðu eisini eitt nú tingmenn og varð hetta tikið upp sum fyrispurningur í løgtinginum, uttan tó at nakar visti at siga hvussu vit her heima kundu hjálpa upp á hetta.

Hetta skundaði nokk eisini undir arbeiði okkara at fáa tikið stigið til hetta átakið, siga Tormóður Stórá, sálarlækni og Kathrina L. Joensen, sálarfrøðingur, ið skipa fyri og sum vóna, at undirtøkan verður góð millum tey, sum kunnu gera ein mun á hesum økinum.

Skeiðið verður hildið á Hotel Føroyum 27. og 28. mei í ár og tilmeldast skal í seinasta lagi 14. mei á *vivatfo@hotmail.com*. Luttakaratalið er avmarkað og strembað verður eftir at samanseta ein luttakarabólk, sum fevnir breitt um tey, sum koma í samband við fólk í sjálvmorðsvanda. Undirvísararnir á skeiðnum eru tríggir normenn, sum hava hildið nógv tílík skeið áður. Kostnaðurin fyri skeiðið er 3000 kr, og tá er eisini íroknað matur og drekka.

Skeiðið verður fyriskipað av Psykiatriska Deplinum í samstarvi við Sálarfrøðistovuna í Tórsgøtu.


Starvslýsing

Heimatænastan

## Starvsfólk til Eldrasambýlið Oman Mattalág í Tórshavn

Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingum, heilsurøktarum og heilsuhjálparum í starvsbrøki 0,7 ella 0,8 og ítrivsvegleiðara í starvsbrøki 0,5 at starvast í nýggja Eldrasambýlinum Oman Mattalág í Tórshavn og at byrja 1. august 2008.

Eldrasambýlið Oman Mattalág er partur av Heimatænastuni Øki 1 í Suðurstreymoy og pláss er fyri 9 búfólkum.

**Hugsjónin fyri Heimið**
Miðað verður eftir at skapa eitt heimligt og virkið umhvørvið út frá Eden hugsjónini og við virðing og umsorgan at stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka búfólkinum.

**Vit vænta av tær, at tú hevur**
- Áhuga í og gleði við at arbeiða við eldri fólki
- Vilja til at starvast í tráð við hugsjónina fyri Heimið
- Vilja at starvast út frá Eden hugsjónini
- Er til reiðar at bróta upp úr nýggjum og ganga aðrar leiðir
- Dugir væl at samstarva og samskifta við onnur
- Er motiverað og fleksibul
- Kann arbeiða í skiftandi vaktum

**Vit kunna bjóða**
- Eitt spennandi og mennandi starv, har tú hevur møguleika at vera við til at byggja upp eitt heim í tráð við hugsjónina fyri Heimið og seta dám á umhvørvið.
- Góða innleiðslu
- Møguleika fyri persónligari menning

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Lønar og setanarviðurskifti eru sambart sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til økisleiðara Ceciliu Vestureið á telefon 217249 ella við telduposti: ceciliav@naerverk.fo ella til deildarleiðaran Tórhild Dalsgaard á telefon 217123 ella við telduposti. torhildd@naerverk.fo

**Umsókn**
Send eina umsókn við avrit av prógvi og upplýsingum um útbúgving og fakligar royndir til:
Heimatænastan
Stílað: Cecilia Vestureið, økisleiðari,
Skálatrøð 14
Fo-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 26. mai 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo



Starvslýsing

Trivnaðartænastan

## Leiðari til Sambýlið í Niðarugøtu í Tórshavn

Søkt verður eftir leiðara til Sambýlið í Niðarugøtu 15 í Tórshavn til setan 1. august 2008.

Í sambýlinum búgva 4 vaksin seinheilaskadd fólk. Virkisstøðið hjá hesum fólkum ber dám av truplum kognetivum avleiðingum og ofta er eisini talan um fysisk brek.

Ynskiligt er, at tann, sum settur verður, hevur kunnleika til og royndir innan arbeiði við fólki, sum hava seinheilaskaða. Eisini er tað ein fyrimunur, um viðkomandi hevur roynt seg sum leiðari áður og hevur framhaldsútbúgving innan økið.

**Sóknast verður eftir fólki, sum**
- hevur viðkomandi útbúgving
- hevur hug og hegni at fyrisita og leiða
- kann standa fyri at fremja broytingar
- hevur vilja og evni at samstarva við viðskiftafólk, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- hevur hugflog at síggja møguleikar fram um forðingar
- kann seta greiðar linjur

**Lønar- og setanartreytir**
Setanarøkið er Nærverkið og tænastustaðurin er í løtuni í Trivnaðartænastuni. Starvið verður sett sambært sáttmála Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til virkandi deildarleiðara Hermann Mortensen á telefon 360000.

**Umsókn**
Umsóknir við hjaløgdum próvskjølum, viðmælum og lívsgongdarlýsing skulu sendast til:

Trivnaðartænastan
Stílað: Hermann Mortensen, virkandi deildarleiðari
Argjavegur 26
Postsboks 3037
Fo-100 Tórshavn

**Umsóknarfreist: 30. mai 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo